Phoenix-skandalan:

# Føroyingar helst mist 250 til 300 mió kr.

FÍGGJARSVIK
*Jan Müller*

Sera torført er at fáa upplýsingar um, hvat føroyingar hava mist í íløgufelagnum Phoenix. Keldur Sosialurin hevur tosað við og sum hava sett pengar í felagið vilja vera við, at rætta milliónaupphæddin, sum føroyingar hava havt í felagnum, er nærri teimum 300 mió kr. enn teimum 100, sum er komið fram higartil. –Rætta talið liggur kanska millum 250 og 300 mió kr. Tað er helst rætt, at talan er um einar 130 føroyingar, sum hava sett pengar í Phoenix, men meginparturin hevur átt upphæddir, sum liggja væl omanfyri milliónina sigur keldan, sum sjálv hevur átt nógvar pengar har men hevur tikið teir út í fjør. –Mannagongdin hevur verið tann, at átti tú meira enn hálvaaðru millión kr. í felagnum, so slapst tú undan kostnaðinum, og tað hevur havt við sær, at nógvir føroyingar hava sett meira enn 1,5 mió kr. í felagið. Eg veit um, at tað eisini eru mong, sum hava sett nakrar 100.000 kr. í felagið og at tað so aftur í hinum endanum eru fólk ella fyritøkur, sum kanska hava sett upp í 15 mió kr. í felagið sigur ónavngivna keldan við blaðið.

Keldan sigur víðari, at veruliga nógvir pengar hava verið at tjent hjá íløgufelagnum í mong ár. Okkurt árið hevur avkastið verið uppí 25%, meðan tað ímeðal kanska hevur verið um tey 10%. –Nógvir føroyingar, sum hava plaserað pengar í Phoenix, hava tjent nógvar pengar sigur keldan, sum eisini vísir á, at tragedian í hesum er so tann, at flestu av føroysku íleggjarunum hava ikki tikið rentuna út sohvørt men hava latið hana standa, so grundfæið er vaksið og harvið aftur rentuinntøkurnar. Nú er so alt mist.

Sum skilst so hava mong fólk í Føroyum, ið hava átt og spart sær nakað uppá á kistubotninum, heldur enn at lata pengarnar standa í føroyskum fíggingarstovnum við lágari rentu, tikið av góða tilboðnum frá Phoenix, og hava plaserað pengar har fyri at byggja sær uppá eina eftirløn ella pensión.

# Eftirlitið fer at kanna Phoenix

**-og vita, um Klaksvíkar Kommuna hevur gjørt nakað skeivt í sambandi við at seta pengar uppá spæl í íløgufelag**

FÍGGJARSVIK
*Jan Müller,*
*Jan@sosialurin.fo*

Roknast kann við at Innlendismálaráðið, sum tekur sær av eftirlitinum av føroyskum kommunum, fer at hyggja nærri at tilgongdini í Klaksvíkar Kommunu, sum hevur sett pengar í útlendskt íløgufelag. Hilmar Høgenni, deildarleiðari í Innlendismálaráðnum sigur við Sosialin, at hann júst hevur frætt um málið, og tað er greitt, at man fer at hyggja at tí. Tað er grein 42 í kommunufyrisitingarlógini, sum umrøður slík mál. Hon sigur nakað um, hvussu man skal umsita peningaognir hjá kommununum. Har stendur m.a. at tær skulu umsitast sum peningur hjá ómyndugum verður umsitin og í tí liggur, at tær skulu umsitast trygt og eisini soleiðis at sum mest fæst burtur úr.

*-Hevur kommunan fylgt hesi áseting?*

-Um hon hevur verið innan fyri ella uttan fyri lógarinnar karm má ein ítøkilig meting til at gera av. Málið í okkara verð er so nýtt, at vit ikki fáa sagt nakað ítøkiligt.

Hilmar Høgenni sigur, at sjálvt um pengarnir í hesum førinum ikki vóru mistir, so er spurningurin aktuellur at viðgera, um hetta er nakað,sum kommunur kunnu seta pengar í. –Kommunur eiga sum prinsipp at hugsa um váðan, tá tær seta pengar í eitt nú eitt slíkt íløgufelag.

*-Er tað vanligt, at kommunur seta pengar í íløgufeløg?*

-Tað hava vit ikki nakra fatan av, men tað kundi verið rætt at kanna hetta, nú eitt aktuelt málið hevur stungið seg upp.

Borgarstjórin í Klaksvík við Rás 2:

## Óhugsað av okkum

ÍLØGUFELØG
*Jan Müller*

-Vit í umsitingini hava ikki verið nóg umhugsnir í hesum førinum. Tað eru so nógv mál, sum fara um hendurnar á okkum, og í hesum førinum kann ein aftaná iðra seg um, at ein kanska ikki steðgaði málinum, segði Steinbjørn Jacobsen, borgarstjóri í Klakvík við Rás 2 á middegi í gjár, tá útvarpsrásin setti honum spurningar um aktuella Phoenix málið. Hann vísti eisini á, at kommunan fór at vera meira varin framyvir.

Uppá fyrispurning um teir hava verið ov bláoygdir og latið tykkum lumpað helt borgarstjórin fyri, at tað er altíð ringt at verja seg fyri sviki og skjalafalsan. –Tað hava vit so ikki mett tá, tá vit tóku hesa støðuna. Men tað var óheppið, at tað skuldi enda so.

Um málið fær avleiðingar sigur borgarstjórin við Rás 2, at hann hevur fult álit á sínum leiðarum, sum geva sær og politikarum ráð. Hetta fær ongar avleiðingar.

# Tøkningar til bygging og framleiðslu

**Føroyska vinnan hevur brúk fyri fólki við millumleiðaraútbúgvin, og tí fer Tekniski Skúlin í Havn aftur undir byggitøkningaútbúgvingina**

ÚTBÚGVING
*Jákup Mørk*

At føroyska vinnan hevur brúk fyri fleiri fólkum við millumleiðaraútbúgving er mangt, sum bendir á. Tað vísur millum annað ein spurnarkanning, sum Tekniski Skúlin í Havn hevur gjørt millum ymsar størri og smærri vinnufyritøkur í Føroyum.

Skúlin sigur, at fyritøkurnar lýstu sín tærv so mikið greitt, at leiðslan á skúlanum ivaðist ikki í aftur at fara undir úbúgving av byggitøkningum. Útbúgvingin til byggitøkning er tann sama, sum fyrstu tvey árini av útbúgvingini til byggifrøðing, og gevur hon góðan førleika til størv innan byggivinnuna, innan framleiðsluvirkir av byggitilfari ella hjá ráðgevandi verkfrøðingum og arkitektum.

Ein byggitøkingur kann m.a. taka sær av leiðsluuppgávum á arbeiðsplássum, at arbeiða sum millumleiðari, verkførari, at framleiða bygningslutir og at hava goymsluleiðslu og stýring. Somuleiðis gevur hetta førleika til at hava byggiumsiting um hendi fyri eitt nú kommunur og land, og at projektera í sambandi við útbjóðing av arbeiði.

Talan er um tvey ára útbúgving, sum byrjar beint eftir summarfrítíðina. Upptøkukrøvini eru, at umsøkjari hevur eina handverksútbúgving innan byggivinnuna ella eina miðnámsútbúgvin.

Til spurningin, um fyritøkan vildi mæla Tekniska Skúla til at fara undir útbúgving av byggitøkingum, svaraðu flestu fyritøkurnar í spurnarkanningini játtandi. Og í fleiri førum var talan eisini um viðmerkingar, sum sera greitt góvu boð um, at útbúgvingin varð tiltrongd.

### Eisini framleiðslutøkningar

Fyri fýra árum síðani fór Tekniski Skúlin annars undir at útbúgva framleiðslutøkningar. Hendan útbúgvingin heldur eisini fram, og somuleiðis byrjar nýtt skúlaskeið her eftir summarfrítíðina. Talan er eisini um tvey-ára útbúgving, og eru upptøkutreytirnar tær somu, sum eru galdandi til byggitøkninga útbúgvingina.

Framleiðslutøkningurin verður útbúgvin til størv innan ídnaðin. Tað kann vera innan maskintøkni ella rakstur. Útbúgvingin gevur førleika til arbeiði sum m.a. millumleiðari, verkførari, arbeiði á teknistovu, goymslustýring, flutningsvirksemi og annað.

Báðar útbúgvingarnar eru at rokna sum sjálvstøðugar yrkisakademiskar útbúgvingar, men samstundis geva hesar eisini góðan møguleika til framhaldandi útbúgvingar innan yrkið, verður sagt í tíðindaskrivi frá Tekniska Skúla.

Freistin at søkja um upptøku til útbúgvingarnar eru 25. apríl.

# Teir vistu av ongum

**Tríggir býráðslimir í Klaksvík siga seg ikki vera kunnaðir um nakra íløgu í Phoenix.**

FÍGGJARSKANDALA
*Snorri Brend*

**Klaksvík:** - Nei, eg minnist einki til nakra kunning um Phoenix, sigur Karl Heri Joensen, fyrrverandi býráðslimur í Klaksvík við Norðlýsið.

Hetta sama siga tveir aðrir fyrrverandi býráðslimir, Jógvan Lützen og Hilmar Danielsen eisini við blaðið.

Men teir avvísa tó ikki, at teir kunnu hava fingið eina munnliga kunning um ætlanirnar hjá kommununi at seta pening í Phoenix.

- Tá talan er um eina munnliga kunning, so verður nevndin oftað kunnað um nógv ymiskt og tí kann vera torført at minnast eitt einstakt mál, sigur Hilmar Danielsen við blaðið.

### Í fíggjarnevndina

Hilmar Danielsen, sum m.a. sat í fíggjarnevndini í Klaksvíkar kommunu sigur seg ikki minnast at vera kunnaður um íløguna í týska felagið.

Hilmar Danielsen, sum er uttanlanda í løtuni, sigur at hann ikki minnist um munnliga kunningin er farin fram, meðan hann hevur verið á fundi í fíggjarnevndini.

Hann vísir til tíðindaskrivið frá býráðnum, har tað stendur m.a.: "at málið varð lagt fyri fíggjarnevndina sum ein munnlig kunning um, at kr. 160.000 blivu fluttar til Phoenix....."

Men Hilmar Danielsen, sum hetta tíðarskeiðið sat í fíggjarnevndini, sigur seg ikki minnast hesa kunning.

- Nú er tað soleiðis at tá talan er um eina munnliga kunning, so verður nevndin oftað kunnað um nógv ymiskt og tí kann vera torført at minnast eitt einstakt mál.

- Eg kann eisini hava verið burturstaddur. Men eg kann bara staðfesta, at eg ikki minnist meg verða kunnaðan um at býráðið hevði ætlanir um at gera íløgu í týska felagið.

- Tað er sjálvandi ikki neyðugt at draga fíggjarnevndina upp í eitt mál, tá talan er um at flyta pening millum peningastovnar. Men tá talan er um at gera íløgur átti hetta at verið lagt fyri fíggjarnevndina sum eitt mál. So hevði málið fingið eina viðgerð í nevndini, sigur Hilmar Danielsen.

### Ikki upp á tungu

Hann fær eisini stuðul frá Jógvani Lutzen, sum sat í býráðnum í 2004. Hann minnist heldur einki til nakra kunning um íløguna í íløgufelagið Phoenix.

Jógvan Lutzen sigur, at hann kom í býráðið í februar í 2004, sum varamaður fyri Jógvan við Keldu.

- Eg minnist onki til at vit eru kunnaðir um íløguna í íløgufelagið Phoenix. Eg eg minnist heldur ikki, at felagið nakrantíð hevur verið tikið upp á tungu í býráðnum, sigur hann.

### Eingin kunning

- Eg minnist als einki til nakra kunning, sigur fyrrverandi fíggjarnevndarlimurin, Karl Heri Joensen, sum tó ikki kann afturvísa at nevndin varð kunnað.

- Nevndin verður av og á kunnað um ymisk mál. Og um vit eisini hava verið kunnaðir um íløguna í týska felagið, kann eg ikki afturvísa.

- Men eg kann bara staðfesta, at sjálvur minnist eg als einki til hesa kunning, sigur Karl Heri Joensen í stuttari viðmerking.

# Ørvur kannar frágreiðing

Arbeiðið, sum skipsførarin Ørvur Thomassen hevur gjørt í málinum um óhappið hjá Norrønu, er ikki ein nýggj frágreiðing um óhappið. Hann hevur gjøgnumgingið og kannað niðurstøðurnar í frágreiðingini hjá Skipaeftirlitinum, og tí kann tað vera misvísandi at kalla viðmerkingarnar hjá Ørvi Thomassen fyri eina nýggja frágreiðing, um tað verður misskilt við eina nýggja kanning av sjálvum óhappinum.
*Blaðm.*